# Væleydna› hondbóltsgalla fyri yngra ættarli›i

*Leygardagin 15. apríl var› skipa› fyri hondbóltsgalla fyri børnum í høllini á Hálsi. Tiltaki› var frá klokkan 15 til 18, og fyriskipararnir lata væl at*

HEINI Í SKORINI





Ikki var› bert skipa› fyri endaveitslu hjá vaksnu hondbóltsspælarunum í ár, men børnini fingu eisini høvi til at luttaka í einum væleydna›um endabresti í høllini á Hálsi leygardagin. Børnini vóru frá 10 til 14 ár, og tiltaki› vardi frá klokkan 15 til 18. Ikki minni enn 450 børn fingu tríggjar gó›ar og undirhaldandi tímar.

Johan í Kollafir›i var frásøguma›ur og leiddi løtuna, me›an tónleikabólkarnir Tangz, Krit, Diatribes og Present Past sluppu at royna seg. Songkvinnurnar Rannvá, Gunn og Kristianna sungu eisini saman vi› Johan í Kollafir›i. Eisini var møguleiki vi› lutakasti at vinna eitt sjónvarp frá Radiohandlinum, eina playstation frá 3´aranum, ein ghettoblastara frá Elding, ein venjingarbúna frá Thomas Dam og tríggjar hondbóltar frá Sport Master. Spenningurin og rómurin var øgiligur, tá vinnararnir skuldu finnast.

Rói Egholm, sum er í foreldrabólkinum hjá Neistanum, sigur, at hetta var eitt væleydna› tiltak, sum fyriskipararnir eru nøgdir vi›.

-Børnini fer›ast kring alt landi› ein heilan vetur, og vanliga er ta› solei›is, at eitt hondbóltsli› møtir upp til dyst, beint á›renn spælast skal, og tá dysturin er av, skal man skunda sær avsta› aftur, so børnini fáa ongantí› møguleikan at læra hvønn annan veruliga at kenna. So rey›i trá›urin vi› hesum tiltakinum er at fáa samla børnini, so tey kunnu koma at læra hvønn annan at kenna. Rói Egholm leggur afturat, at børnini læra eisini gjøgnum hetta tiltak at spæla og kempa ímóti hvørjum ø›rum á vøllinum, men so uttan fyri vøllin at vera vinir.

Men Rói sigur eisini, at ta› ver›a broytingar til næstu fer›.

-Skulu vit seta fingurin á naka›, so er ta› umrá›andi til næstu fer›, at vit fáa børnini at blíva meira aktiv teir tríggjar tímarnar, tiltaki› varar. Ta› var kanska naka› nógv av undirhaldi og tónleiki, og á tann hátt gjørdust børnini ov passiv.

Rói heldur tó, at tríggir tímar er sera hóskandi fyri eitt sovor›i› tiltak, og orsøkin til, at løtan var frá 15 til 18, var, at øll, sum komu av bygd, skuldu hava møguleikan at sleppa aftur til hús.

-Tey komu jú úr øllum Føroyum at vera vi› til hetta tiltak. Li› sum VB, StíF, Stjørnan og Tjaldur vóru umbo›a›, so tey komu úr øllum her›ashornum í Føroyum. Tí hildu vit, at tey skuldu hava møguleikan at sleppa heimaftur vi› Srandfer›sluni.

Rói sigur, at hevur ein í huga, at fólk seta bæ›i tí› og pengar av til eitt slíkt tiltak, setir ta› størri krøv til fyriskipararnar, og ta› ætla tey heilt víst at gera naka› vi› í framtí›ini.

Nøkur vaksin vóru eisini vi› henda leygardag seinnapart, og vóru ta› mest venjarar og foreldur. Men ta› var skipa› solei›is, at tey høvdu møguleikan at sita vi› sí›una av og fáa sær ein kaffimunn, me›an børnini stuttleika›u sær inni í sjálvari høllini.

Ta› er heilt víst at frøast yvir, at børnini nú eisini hava møguleikan at luttaka í einum hondbóltsgalla, og at hetta ikki bara er galdandi fyri leikararnar í fyrstu deild. Hetta fer óiva› at hava positiva ávirkan á ungu hondbóltsleikarar okkara, og vónandi ver›ur hetta eisini vi› til at menna føroyskan hondbólt í framtí›ini.

-Hevur ein í huga, at hetta var eitt heilt n‡tt tiltak, sum eingin hevur tiki› stig til fyrr, so halda vit, sum skipa›u fyri, at hetta var rímuliga væleydna›, og at hetta er naka› at byggja uppá í framtí›ini, men tó vi› broyttum karmum, sigur Rói Egholm.

Rói leggur eisini dent á, at næsta ár fara tey at gera nógv fyri at fáa tiltaki› meiri attraktivt, tí ta› skuldi veri› upp ímóti 900 til 1000 børnum, tá ein eisini hevur í huga, at børn ikki fylla serliga nógv í eini høll.

Eitt mistak var kortini gjørt hesafer›, og ta› var, at fyriskipararnir lótu søluna av atgongumerkum út í feløgini. Ta› vil siga, at teir bó›u feløgini fáa atgongumerkini út til børnini, og ta› stendst nógv strí› av tí. Ta › er, eftir metingini hjá Róa, kanska ov nógv kravt av venjarum og fyriskiparum, at bi›ja teir syrgja fyri at selja atgongumerkir til øll børnini, eftir at teir hava havt eitt hart kappingarár. Men Rói sigur, at ta› vóru nógv, sum gjørdu eitt sera gott arbei›i á tí økinum.

-Ein møguleiki til næsta ár er at lata atgongumerkini út á allar bensinstø›irnar í landinum í sta›in fyri ta›, sum vit gjørdu í ár, og so kunnu børnini sjálv ogna sær atgongumerkini, endar ein av stigtakarunum til n‡ggja og gle›iliga fyribrigdi› í føroyskum ungdómshondbólti.







# Hugmynd um Súsannu Hansen



*Myndin vísur flokkin hjá Súsannu á námsferð í Rom fyri júst einum árið síðan, á páskum síðsta ár. Ein frálíkur upplivilsisríkur túrur. Súsanna sum kassameistari og „primos motor“ saman við floksfeløgunum, legði stóra orku í, at dreymatúrurin, skuldi gerast veruleiki. Vit løgdu frá landi úr Hvalba við sluppuni Johonnu til Rom, og hóast verkfall, maskinbrek á flogvøllinum og NATO, ið legði uppí kríggið við flogførum, ið lætti úr Italia, so náddu vit at uppliva Pæturskirkjuna, Colesseum, Pompei og onnur religiøs og søgulig stórverk saman. Á Pætursplássinum hoyrdu vit pávan messa á páskum á allskyns tungumálum fyri rørdari mannamúgvu allastaðir frá*

**Suðuroyggin**
**á Grækarsmessu ár 2000**

Tjaldrið, dúgvan og pisan
fræls millum himmal og jørð
ímyndir og fyrimyndir vit fylkjast um

Vælkomin tjaldur, ljóðar kring landið
fólk gleðast og fylkjast
tjaldrið, ímyndin um vár, sól og frælsi

9. mars byrjar sum veðurdagurin øll longdist eftir
endiliga skein sólin og alt var so ómetaliga vakurt
Brádliga støðgar alt upp og stirnar
Í skúlan komu feigdarboð

Runnin í stein, standa vit spurin
nei, nei, nei, skríggja innaní
ikki Súsanna
Súsanna, ið er, var, er
øllum so ómetaliga kær og nær

Hendan fyrsta Grækarismessudag í ártúsundskiftinum
er Suðuroyggin aftur niðurboygd í sorg
fjálturstungin mannabørn
fylkjast úr land og ríki
bivandi í trega, undran og skelkaði inn á merg
úr ytstu rúmd og inn í hjartarøturnar skrálar og ekkóar
dýrmæta lív
so egið

Sum fagrasta norðlýsið á svarta náttarhiminum
lýsir lívið upp
lívsmyndir, orð, látur og andlitsbrá
lýsa upp
rísa upp
ríva seg úr deyðans fjøtrum

So lítil og máttleys vit menniskju
tá deyðans hond
miskunnarleys skrykkir í so mong
nýupprunnin lív

So óskiljandi og grúsama sárt
at Súsanna er farin
Vit fylkjast, fylgja, fylt av missi, kenslum og samkenslum

Foreldur, omman, gubbar og gummur, nú so eina
ættin, skúlafelagir og vinir
býurin, oyggin og landið
Súsanna so ung, hon fevndi vítt og rakti djúpt

Samkenslan við øllum foreldrum og systkjum, ætt og vinum
ið hesuferð fylgdu Súsannu
ið nýliga hava fylgt sínum egnu
somu tungu leið
øll so titrandi ung
skrykt úr rót í fagrasta blóma

Óvæntað
Óskiljandi
fyri øll

Teir byrjaðu við skúlaárinum
hugagóðir á Miðnámsskúlanum
Eyðun og Hávardur
so eyðagóður, fittligur, opnir og góðlýddir
báðir evnaríkir og lívsglaðir unglingar
Hávardur og Eyðun settu sín dám á flokkin
skaptu saman við floksfeløgunum
eitt positivt námsfrøðiligt flokshuglag
Søguliga settu teir saman
fryntuliga lótu teir úr hondum
síðsta handaverkið
uppgávur teir nevndu:
„Vores vidunderlige Verden“ skrivar annar,
„Vores underlige Verden“, hin.

Heimurin undranarverdur og undurfullur
ja, undrandi síggja vit
missa og syrgja um
sárbæra og dýrmæta lív

Súsanna 19 ár
3. ársnæmingur á Miðnámsskúlanum
sjáldsama evnarík, eyðmjúk og lítillátin
eitt menniskja, øll høvdu fult álit á
náttúrliga ábyrgdarfull
altíð djúpt innlit og fult yvirlit
Súsanna, skúli, næmi, skapan og ábyrgd
vóru ein og sami samleiki
altíð ein hjálpandi hond
allastaðir uttan hóvasták

Gjøgnum alla tíð og rúmd
hava menniskju nýtt ímyndir og fyrimyndir
sum varðar, vitar og gongustjørnur
á lívsins stetlandi vallaraferð
millum himmal og jørð
jørð og himmal
trilvandi millum himmalskar og jørðiskar fyrimyndir

Ímyndir og fyrimyndir vit fylkjast og gleðast um
sum vit ikki kunnu liva ella doyggja fyriuttan.

Tjaldrið, smálomb og smábørn
nýkomin smá lív
men fyrimyndarligar ímyndir
um lívsnærveru og gleði
Soleiðis Súsanna
altíð lívsglað og nærverandi
nú fjar
tó nær

Dúgvan, ímyndin av heilagum anda
trúgv, vón, kærleika og friði
Súsanna hevði djúpa trúgv
andaliga styrki og sterkan vilja til tað góða

Pisan, ímyndin av studentinum
Súsanna ein sjálvstøðug og von pisa
við so útmerkaðum ummælum og persónsmensku
sum fáum er litið í lut
kom ikki at lætta flogi millum okkum
saman við floksfeløgunum í summar

Súsanna hevur lætt flogið
inn í annan heim
tó - hennara hugflog, vit og trúgv
fylgja fyrimyndarliga okkum øllum
ið upplivdu og livdu í hennara rúmd
Í okkum, okkara hugaheimi og millum okkum
livir hon
í okkara trúgv og vón
er lívið lív og deyðin deyður

Farvæl og takk á hesum sinni, vina mín

**Maud Næs**